## Nýggjur skúli í Runavík

Í morgun var fyrsti parturin av nýggja skúlanum í Runavík tikin í nýtslu. Tá fluttu næmingarnir í framhaldsdeildini inn í teir fyrstu 1.500 fermetrarnar av skúlanum. Gongst sum ætlað, flyta næmingarnir í 4. til 7. flokk inn í skúlan í summar. Sambært útvarpinum hjá Kringvarpinum verður skúlin 4.800 fermetrar, sum standa lidnir eina ferð í heyst. Har verða tilsamans 18 flokshøli, umframt nútímans fakhøli, bókasavn, lærarastovu og matarhøll til 150 fólk. Arbeiðið at gera skúlan byrjaði á heysti 2006, og higartil hevur alt gingið eftir ætlan.



## Valstríð á MySpace

Dimmalætting skrivar í dag, at fleiri politikarar royna at vinna sær atkvøður á alnetinum. Millum annað John Johannesen úr Javnaðarflokkinum og Heðin D. Poulsen úr Sjálvstýrisflokkinum hava ein profil á vælumtókti heimasíðuni MySpace.com. Hesir profilar á heimasíðum sum tildømis MySpace.com, koma sjálvsagt aftrat persónligu heimasíðunum hjá valevnunum. – Hetta er eitt frálíkt forum at knýta sambond og at samskifta um ynskir og krøv frá nútíðar veljarafjøldini, skrivar John Johannesen á sínum MySpace profili veit Dimma at siga.



*Hvørki koppaði lastbilurin ella óhappið við bussinum førdi til nakran mansskaða*
*Mynd: Heini S. Kristiansen*

# Góð ársbyrjan ... og tó

**Løgreglan hevði millum lítið og einki at takast við ársins fyrsta vikuskiftið. Ein koppaður lastbilur og ein fráboðan um eina minu í Sandagerði, sum tó ikki var ein mina, er millum fáu tingini, løgreglan tók sær av**

LØGREGLUTÍÐINDI
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Stak friðarligt. Soleiðis lýsir vakthavandi á løgreglustøðini í Havn vikuskiftið. Ársins fyrsta vikuskiftið spældi soleiðis væl av hjá teimum allar flestu. Í Havn tóku tey ongan fyri rúsdrekkakoyring, eingin brot á politiviðtøkurnar og einki harðskapsmál sum so.

– Fólk hevur brúkt pengarnar um jólini og tað sæst aftur í býarlívinum, sigur vakthavandi. Hann letur at, at tað er stórur munur á aktivitetinum í býnum, tá fólk hava fingið løn og hava pengar um hendurnar, og tað so pengarnir eru brúktir.

### Mina í Sandagerði

Seinnapartin sunnudagin fekk løgreglan eini fráboðan av teimum meiri óvanligu. Onkur hevði sæð eina minu í Sandagerði, sum er mark millum Argir og Havnina. Løgreglan kom á staðið og staðfesti beinanvegin, at talan ikki var um eina minu, men heldur eina orienteringsboyu, sum hevði slitið seg leysa.

Hált var fleiri staðni kring landið tíðliga í morgun, men í Havnini høvdu tey ikki fingið nakra fráboðan um ferðsluóhapp, tá vit tosaðu við løgregluna klokkan knappliga tíggju í morgun.

### Bussur og bilur rendu saman

Tað høvdu tey hinvegin í Eysturoynni. Klokkan nærkaðist seks í morgun, tá løgreglan í Runavík fekk eina fráboðan um, at ein bussur og ein persónbilur høvdu rent saman. Tað var við vegakrossin millum omankoyringina frá Oyndarfirði og vegnum millum Fjarða, at óheppið hendi í hálkuni. Eingi ferðafólk vóru í bussinum, og sambært løgregluni í Eysturoy stóðst eingin persónsskaði av óhappinum.

### Koppaður lastbilur

Í Suðuroynni siga tey somuleiðis, at vikuskiftið var av teimum friðarligu. Tveir mans svóvu rúsin av sær á støðini, men annars hendi ikki so nógv. Inn til í gjárkvøldið, tá ein lastbilur koppaði á keiini á Tvøroyri.

Lastbilurin skuldi lyfta ein trukk úr lastini og hevði sett beinini út í vinstru síðu. Lastbilførarin var tó gáloysin eina lítla løtu, og av onkrari orsøk lyfti hann trukkin út í høgru síðu við tí úrsliti, at lastbilurin koppaði. Tíbetur stóðst eingin persónskaði av óhappinum, og sambært løgregluni í Suðuroy var fekk lastbilurin bert smávegis skaða.



*Mynd: Bjarni Nygaard*